FØÐINGAR

29. nov. fingu Masa Ørvarodd og Dannye Nielsen, Amager, eina dóttur. Hon var 53 cm. og vigaði 3540 gr.



7. januar 2003 fyngu Jenny Winther Poulsen og Mortan Zachariassen í Keypmannahavn eina dóttir. Hon varð 51 cm. long og vigaði 3652 gr.

7. januar fingu Hergerð Andreasen, Klaksvík og Ragnar Heinesen, Viðareiði, ein son. Hann var 55 cm. og vigaði 4000 gr.

8. januar fingu Hertha Johannesen og Leif Danielsen, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 50 cm. og vigaði 3100 gr.

10. januar fingu Herdis og Reidar Nónfjall eina dóttur, hon var 56 cm. og vigaði 3980 gr.

10. januar fingu Brindis Joensen og Brian P. Poulsen, Havn, eina dóttur. Hon var 53 cm. og vigaði 4400 gr.

10. januar fingu Margretha Hammer, Tórshavn og Bárður Isaksen, Kvívík, eina dóttur. Hon var 55 cm. og vigaði 3850 gr.

11. januar fingu Heidi og John Park, Froðba, ein son. Hann var 53 cm.og vigaði 4300 gr.

12. januar fingu Dagmar Augustinussen og Jákup Eyðun Gullbein, Tórshavn, ein son. Hann var 53 cm. og vigaði 3525 gr.

12. januar fingu Vanja Engskær og Rúni Leitisstein, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 51 cm. og vigaði 3600 gr.

12. januar fingu Guðbjørg Abrahamsen, Fuglafjørður og Nikael Mortensen, Argir, ein son. Hann var 54 cm. og vigaði 3600 gr.

14. januar fingu Arngerð Diana Hansen og Jan Joensen, Argir, ein son. Hann var 53 cm. og vigaði 3550 gr.

ANDLÁT

09.01.
Jógvan Jacobsen, Nólsoy, 83 ár.
Herluf Danielsen í Saltnesi, 89 ára gamal.

14.01
Johanna Samuelsen, Lilla, Tórshavn, 97 ár

15.01
Elsebeth Súsanna Mortensen, Porkeri, 86 ár

LÆKNAVAKTIR

Tórshavn:
Læknavaktin tlf. 310033

Eysturoy:
Leygardagin 18.1. Runavík, tlf. 44 80 16
Sunnudagin 19.1. Runavík, tlf. 44 80 16

Norðoyggjar:
Læknavaktin tlf. 458888

Vágar: tlf. 332413

Suðuroy (norður): tlf. 371560
Suðuroy (suður): tlf. 373030

Tannlæknavakt, Tórshavn
Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 10-11. Tlf. 314544.

TILTØK

Gudstænastur
2. sunnud. eftir trettanda
Havnar kirkja: kl. 11 Sverri Steinhólm
Kaldbak: kl. 12 altarg., Bjarni Bæk
Miðvágur: kl. 12 altarg., Peter Dyhr Jørgensen og David Johannesen
Christianskirkjan: kl. 11, útvarpsgudstænasta, Hans Eiler Hammer
Mikladalur: kl. 12, altarg. Niels Pauli Danielsen
Hattarvík: kl. 12 altarg.,
Kirkja: kl. 17 altarg., Elsa Funding
Eiði: kl. 11.40 skriftamál, kl. 12 messa,
Norðskála: kl. 17 messa, Emil Olsen
Vesturkirkjan: kl. 11 Heri Joensen
Sjóvar kirkja: kl. 11 altarg., Bergur D. Joensen
Søldarfjørður: kl. 11, Meinhard Bjartalið
Funningsfjørður: kl. 12, altarg., Uni Næs
Vestmanna: kl. 12, altarg., Inga Poulsen Dam
Fámjin: kl. 12, Jónsvein Bech
Hvalba: kl. 12.30 Ólavur Rasmussen

KFUM og K í Havn
Mánadagin kl. 15 í KFUK: Eldrasamkoman v/ Emil Olsen, presti. Evni: Prædikarin.
Týsdagin kl. 17 í KFUK: Várgleði.

Hebron, Argir
Sunnudagin kl. 10.30 Minnismáltíð Harrans – íneðan er barnaansing, kl. 12 Sunnudagsskúli – samstundis er møti, har Sverri Steintún talar. Heimasíða: www.hebron.fo

Meinigheitin í Hoyvík
Uppi á Brekku 3
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Petur Háberg.
Mánakvøldið kl. 20.30 Bønarmøti.

Rhema á Hálsi
Mikukvøldið kl. 20 Húsmøti hjá Ann Mari og Fríðtór Debes, Bringstún 4, Argir. Fríggjakvøldið kl. 18-19.30 ATAP (Barnaklubbur). Sunnudagin kl. 17 Møti og sunnudagsskúli (bøn 1/2 t. áðrenn møti). Øll eru vælkomin. www.rhema.fo

Frelsunarherurin, Tórshavn
Fríggjadag kl. 20.30 Bønarkvøld.
Sunnudag kl. 11 Møti, kl. 17.30 Bøn, kl. 18 Møti, Siv Joensen talar.
Mánadag kl. 17 og 19 Skótafundir.

Aglow, Tórshavn
Fundur verður í hølunum hjá Frelsunarherinum leygarkvøldið 18. januar kl. 19.30, allar kvinnur eru vælkomnar.

Meinigheitshúsið
Leygarkvøldið kl. 19.30-22 Juniorhugni fyri 6. flokk og eldri.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við Sverra Steinhólm, Sound of Glory syngur.

Tórshavnar Hvítusunnusamkoma
Yviri við Strond
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti, kl. 18.00 Evangel. møti. Øll eru vælkomin.

Filadelfia, Landavegur 22
Í dag kl. 17 Landsbøn. Í morgin kl. 11 Morgunmøti v/ Símun Absalonsen, kl. 11.30 Barnagudstænasta, kl. 16 Samkomufundur.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarskúlin.
Møtiskráin hjá Filadelfia sæst á heimasíðu okkara: www.filadelfia.fo

Samkoman Immanuel
Sunnudagin kl. 13 Sunnudagsskúli, kl. 17 Møti.

Katólska Kirkjan
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Messa í Kerit.
Leygardag kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11 Hámessa í Mariukirkjuni. Aftaná verður kirkjukaffi. Sunnudagsskúli kl. 14.

Ebenezer
Sunnudagin kl. 10 Breyðbróting, kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti við luttøku av Levi Joensen o.ø. og sangkreftum úr Betesda.
Mikukvøldið kl. 20 Bønar- og uppbyggingarmøti.
Heimasíðan www.ebenezer.fo

Samkoman Lívdin
Sunnumorgun í Hoyvíkar skúla kl. 10.30 Upptøka til útvarpsmøti, Jógvan Zachariasen talar um: Hvat segði Jesus um náði? og tilbiðjanarmøti. Kl. 12 talar Jógvan Zachariasen um: Boðini, 10. boð. Barnaansing er undir báðum møtunum og sunnudagsskúli er kl. 12. Millum møtini er drekkamunnur.
Týskvøld kl. 19.30 Bøn- og bibliutími úti á Fløtum, Zacharias Z. undirvísir um Nehemias 3/4. Heimasíða www.lívdin.fo

Zion, Kollafjørður
Ungdómsmøti verður leygarkvøldið kl. 20, Dánial Petersen og onnur ung úr Havn luttaka við vitnisburði og sangi. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Vestmanna missiónshús
Í kvøld er møti kl. 20 við Streingjakórinum úr Sørvági við talu og sangi.
Missiónsvikan heldur fram í morgin kl. 14.30 við sunnudagsskúla og møti kl. 19 við Una Næs, presti og Jónhilda og Gulakur Hansen úr Tjørnuvík og sangbólkurin Gittit syngja.

Saron, Vestmanna
Leygardagin kl. 20 Evangel. møti í avhaldshúsinum í Vík. Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti v/ breyðbróting, kl. 18 Evangel. møti í avhaldshúsinum í Vík.
Mánadagin kl. 20 Bønarmøti. Telefonandaktin 424741.

Hvalvíkar missiónshús
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við luttøku úr Kollafirði. Øll eru vælkomin.
Sjómanskvinnuringurin kemur saman týskvøldið kl. 20, allar kvinnur eru vælkomnar. Minst verður á at missiónsvikan byrjar mikudagin 22.01. kl. 18. Lýst verður nærri í týsdagsblaðnum.

Keldan, Skálafirði
Leygarkvøld kl. 21 Opið hús við Jan Jacobsen.
Sunnudagin morgunmøti kl. 11, Barnamøti kl. 11. Evangeliskt møti kl. 19. Vælkomin í Kelduna.
www.keldan.fo
Alpha skeið fyri vaksin byrjar í Kelduni í Skálafirði 21. januar. Tekning á tlf. 448755 ella www.keldan.fo
Vælkomin í Kelduna.
www.keldan.fo

Meinigheitshúsið á Skála
Eingin bibiltími í kvøld 16.1. og einki møti sunnukvøldið vegna missiónsviku á Strondum.

Soli Deo Gloria
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.
Leygarkvøldið kl. 20 Fyrilestur fyri pør.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti.

Thabor, Fuglafjørður
Leygarkvøldið kl. 21 Ungdómsmøti við Steen Palmquist.
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti.

Gøta
Ungdómsmøti verður í kirkjukjallaranum í kvøld kl. 20. Marius Jacobsen verður við. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Lívsins Orð
Sunnudagin kl. 10.30 Møti við Pola Jacobsen. Liljurnar byrja aftur mánadagin kl. 17 og ungdómsmøti kl. 20.

Betania, Skopun
Leygardagin kl. 15 Felags barnamøti.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Evangel. møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Missiónshúsið á Tvøroyri
Ungdómsmøti verður leygarkvøldið kl. 20.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli. Kl. 18 Møti við Jónsvein og Heidi Bech.
Bønarmøti verður hálvan tíma áðrenn møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Salem, Tvøroyri
Fundarrøð við Poul Færø & John í Skemmuni heldur fram í kvøld kl. 20 og sunnudagin kl. 18. - Eftir fundin í kvøld verður samkoma fyri ung. - Á fundunum leygarkvøldið og sunnukvøldið luttekur sangkórið.

EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

Tey, ið sáa við gráti, skulu heysta við gleði. Grátandi fara tey sáandi sáðið, fegin koma tey berandi bundið.
Sálmur. 126. 5-6

Danski presturin C. Skovgaard-Petersen sigur einastaðni frá einum minni, hann hevur úr einari lítlari sókn, har hann sum ungur var prestur. Ein sunnudag eftir gudstænastuna kom bygdaráðsformaðurin at tosa við hann. »Prestur, tygum vita ivaleyst um einkjuna í Vesturgøtu, at hon eigur ein son, ið hon hevur havt stóra sorg av. Fyri mongum árum síðani rýmdi hann til stórbýin, og har hevur hann reika millum løgreglukliv-an og fátækranaherbergi. Nú ein dagin doyði hann so har yviri, og løgreglan hevur nú sent mær eitt bræv, sum lá í einum lumma í hansara skitnu og kloddutu klæðum. Sum prestur vilja tygum kanska geva mammu hansara brævið, samstundis sum tygum boða henni frá, at hann er deyður«. Tað lovaði eg – og fekk so brævið – tað vísti seg at vera eitt brævi frá gomlu, gudrøknu mammu hansara, skrivað í kærleika av einum rørdum hjarta og av biðjandi hondum til hennara »burturfarna sonar«. Eftir dagfestingini at meta, var brævið gamalt, rukkut – og heilt týðiliga væta av mongum tárum. Tað sást væl hvussu ofta tað var lisið og hvussu sonurin hevði vart um tað, sum sína einastu klenodiu. Tá ið móður hansara hevur sitið eina løtu við brævinum í hondini, tók hon nakað soleiðis til: »Gud hevur vissuliga á hendan hátt sent mær tár míni aftur fyri at teska mær: Títt strið fyri barni tínum var ikki til fánýtis«.

Á ymiskan hátt kann Gud senda okkum tár aftur. Men vóru tárini bønar og forbønar tár, so verður tað ein gleðiligur dagur, tann dagin, »vit fáa tey aftur!« – Tí tá bera tey boð um, at tað sáð, ið tárini innibera undir Guds vælsignilsi, eisini kunnu spíra í harðari og turraði jørð.

Amen!

John S. Myllhamar

TILTØK

Aglow, Suðuroy
Møti verður leygarkvøldið kl. 20 í Café One Way, Tvøroyri. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

Betel, Vágur
Sunnudagin kl. 11 Breyðbróting, kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. fundur. Mánadagin kl. 20 Bønarfundur.
Ónsdagin kl. 20 Uppbyggingarfundur.

Frelsunarherurin, Vágur
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti við Elisabet Joensen. Mánakvøldið kl. 20 Heimaforbundið.

Føroyahúsið
Sunnudagin 26. jan. kl. 17 verður Evangel. møti í Føroyahúsinum, Vesterbrogade 17A, Keypmannahavn, Øssur Berghamar talar. Á skránni verður eisini felagssangur, sangframførsla og annað. Aftaná verður ókeypis drekkamuður. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Dagtilhaldið í Vági
er opið hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15.00-18.00. Øll kunnu vera við.

Dagtilhaldið Fløvin
kemur saman mánadagfríggjadag kl. 15.00-18.00 í húsunum hjá Kongshavnar Kvinnufelag.

BRÚKARASAMTAKIÐ
Brúkarasamtakið er felag fyri brúkarar í Føroyum. Limagjaldið er 100 kr. árliga. Øll, einstaklingar frá 16 ár og feløg, kunnu gerast limir við at skriva til postaðressuna niðanfyri, ella venda sær til ein í nevndini: Ingun Simonsen, forkvinna, 317782/211696, ingun@post.olivant.fo
Hans Pauli Strøm, skrivari, 424044/221919, hps@kallnet.fo
Gunnleivur Dalsgarð, kassam., 314868/311210, gunnleiv@starvsmf.fo
Høgni Debes Joensen, 311832, trongrim@post.olivant.fo
Kristina Samuelsen, 311883/211883, kris@logting.fo
Brúkarasamtakið, Postboks 165, 110 Tórshavn

Reyði Krossur Føroya
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630. Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórshavn tlf. 319130/61 655400.

Tilhaldið
í Tórsgøtu 21, tlf. 316491
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
Mánadagin 13. januar
kl. 9.45-10.15 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10.15-12 Ítriv
kl. 14-18 Kortspæl, telving og onnur spøl. Tilmelding til døgurðan mikud. og fríggjadag tlf. 316491
Týsdagin 14. januar
kl. 10-12 Vit baka
kl. 10-11.30 Sangur, Jóhan R. Jacobsen. Øll eru hjartaliga vælkomin
kl. 15 Frásøgn úr Tanzania. Elna Skylv Hansen
Mikudagin 15. januar
kl. 10-13 Matgerð, Anne Grethe Harlou. Høvi er at koma sum gestur
kl. 15 Túrur. Sjá skrána í bløðunum
Hósdagin 16. januar
kl. 10-10.30 Fimleikur Sonja Danielsen
kl. 14-17 Telduprát, Brandur Petersen
Fríggjadagin 17. januar
kl. 10-13 Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12 Døgurði – høvi er at koma sum gestur
kl. 13-17 Opið hús

Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

Felagið Tórshavn
Sunnudagin 19. jan. verður gingið eftir kommumarkinum móti Kirkjubø/Velbastað kommunu. Farið verður av Kunningarstovuni kl. 10.30. Gingið verður 3-4 tímar. Havið heit og góð gonguklæði og ein drekkamunn við. Tilmelding.

Spælistovan í Meinigheitshúsinum
er opin frá kl. 9.00-12.00 mánadag, mikudag og hósdag fyri foreldrum við børnum uttan ansing.

Frá felagnum Pinkubarnadeyði
Vit hittast 2. leygardag í hvørjum mánað í Jákupsstovu í J. Patursonargøtu 24 í Havn. Nærri fæst at vita frá Annvør Nielsen tlf. 317261 ella Sólgerð Foldbo, tlf. 422184

Heilaskaðaráðgeving
Spyr um alt innan heilaskaða. Fyri bæði heilaskadd, avvarðandi og tey, ið arbeiða við afturvenjing.
Sendið okkum eitt meyl til neozone@neozone.dk
NeuroPlan, BellaVista, Bellevuevej 7, 2. tv., 2930 Klampenborg, Danmark.
Tú kanst eisini ringja til: tlf. +45 39902665 (Jón) mobil: +45 24430903 (Jón)
www.neozone.dk

AA-fundir í Havn
Reinsaríið, Tórsgøta 5: Roykfríur fundur í morgun kl. 9-10. Fundur verður í kvøld kl. 17-18 og sunnudagin kl. 11-12.
Heimasíða: http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

AA-fundur í Eysturoy
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan.
Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

AA-fundir í Vágum
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

Al-Anon í Vágum
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

AA í Vági
AA fundir verða í Undirhúsinum onsdag og leygardag kl. 19.00.

AA-Suðuroy
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19 og sunnudag kl. 15.
Hvønn sunnudag síðst í mánaðinum – opin fundur kl. 15.

Bláí Krossur – Glyvrar
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

Bláí Krossur – Eiði
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

Náttarravnarnir í Tórshavn
Tín stuðul ger mun! Blív limur ella gang ein royndartúr. Ringið Carl 215570, Guðrið 220019, Hans Jákup 217818, Tone 261165, Ella 316261, Arni 222552

ACA
(Adult children anonymous). Fundur fyri tilkomin, ið eru uppvaksin í alkoholiskum ella dysfunktionellum familjum er hvørt leygarkvøld kl. 20.00-21.30 í Reinsaríinum, Tórsgøta 5, Tórshavn.
www.aca-danmark.dk.
E-mail: acafaroeislands@hotmail.com

Opin roykfríur fundur fyri øll áhugaði er hvønn sunnudag kl. 16.00-17.00, í Mariukirkjuni, Varðagøta 16.

Kvinnuhúsið
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

Føroya Heimavirkisfelag
Postboks 1209 - 110 Tórshavn.
Teldupostur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til formannin: Nigro Hermansen tlf. 314304 / fartlf. 288304.

LFÚ-skrivstovan
hevur opið mánadag og mikudag millum kl. 12 og 16 og týsdag kl. 16-18.
LFÚ-ráðgevingin hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 16-18.

BRÚDLEYP

Leygardagin 25. januar kl. 14.00 giftast í Adventistakirkjuni í Havn Amanda Joensen, Havn og Magni Andreasen, Fuglafjørður. Vælkomst verður í bygdarhúsinum í Hósvík kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, vinarliga ringið á tlf. 310309 ella 444619 áðrenn 18. januar.

Leygardagin 1. februar kl. 13.00 giftast í Miðvágs kirkju Beinta Joensen, Miðvágur og Regin Joensen, Tórshavn. Kl. 14.00 verður opið hús hjá Paulu og Karl Jóhan í Miðvági, har øll eru vælkomin. Kl. 19.00 verður døgurði fyri innbodnum á Hotel Føroyum.

SILVURBRÚDLEYP

Týsdagin 21. januar kunnu hjúnini Jancy og Hansemann Samsonsen halda 25 ára brúdleypsdag. Tey verða at hitta heima í Dr. Dahlsgøtu 2, kj., frá kl. 07.00 til 13.00, har tað verður morgunmatur. Vælkomin.

GULLBRÚDLEYP

Í dag, 18. januar hava Hjørdis og Finn Joensen í Sandavági gullbrúdleyp. **Vegna serligar umstøður er gullbrúdleypsveitslan avlýst.**

PRÓGV

16. januar fekk Høgni Kastalag, Klaksvík, prógv sum arkitektur maa. á Arkitektaskúlanum í Aarhus.